gult cyan magenta svart

VB ger heimaarbei›i›

Vágbingar fara til vinarb‡in hjá Vágs kommunu, Nakskov, at fyrireika seg til seinnu helvt av kappingarárinum

Ongantí› á›ur hevur VB veri› so væl fyri í kappingini um FM, sum teir eru ta›, nú ta› er summarste›gur.

Og vágbingar ætla sær at gera ta›, sum teir kunnu, fyri at vera væl fyri, tá ta› um f‡ra vikur ver›ur fari› undir aftur landskappingina.

Annan fríggjadag fer VB vi› Norrønu til Danmarkar. Máli› er Nakskov, sum er vinarb‡ur hjá Vági. Kommunan har ni›ri eigur ein ítróttarmi›depul, sum teir hava bjó›a› vinunum úr Vági at halda til í. Vallir og kringumstø›urnar annars eru í lagi, og Popczynski hevur syrgt fyri fleiri venjingardystum, bæ›i í Nakskov og í økinum rundanum.

Sekstan spælarar vera vi› í fer›alagnum. Í alt fara nítjan ella tjúgu fólk av landinum, og spælararnir eru grei›ir yvir, at talan ver›ur ikki um frítí›, men um venjing, venjingardystir og aftur venjing:

– Treytirnar hjá vertunum har ni›ri eru lagaligar. Felagi› rindar ein part av fer›-ini, og spælararnir rinda sjálvir ta›, sum restar í.

Hetta sigur Mannbjørn Tausen, forma›ur í VB, sum sjálvsagt er sera spentur, hvussu ta› fer at roynast eftir summarste›gin.

VB fær ongan n‡ggjan spælara, men teir missa ein. Janus Kjærbo fer 1. august til Danmarkar at læra til løgreglumann, so hann ver›ur ikki vi› ta›, sum er eftir av hesum kappingárinum, og hann ver›ur ivaleyst líti› vi› tey komandi árini.

Ta› hevur ljó›a›, at Jón Pauli Olsen eisini skal fara av landinum, men vit hava skilt ta› solei›is, at hann ver›ur í Føroyum inntil fótbóltsári› ver›ur li›ugt sí›st i september, og ta› ver›ur greitt, um VB hevur vunni› fyrsta meistaraskapin nakrantí›, um teir fyri fyrstu fer› hava fingi› hei›urskrónur ella um teir kanska aftur skulu vinna sær pláss í Intertoto Cup.

Og so skulu vit koma vi› einari rætting. Leygardagin skriva›u vit, at ta› var HB, sum í 1977 tapti steypafinaluna móti TB. Ta› var ikki rætt. TB vann ísafjar›arsúluna í kapping vi› VB. Vágbingar vunnu fyrra dystin á Tvøroyri 3–1. Tí var ta› eitt sera stórt vónbrot, tá teir á heimavølli taptu 3–0 móti TB. Vit bi›ja vágbingar og lesararnar annars orsaka mistaki›, samstundis sum vit ynskja VB gó›a fer› til Danmarkar.

Fer›alagi› úr Vági ver›ur aftur í Føroyum 31. juli.
jh

Vágbingar fara av landinum á venjingarlegu

Savnsmynd

Coca-Cola®

CONNECT RED™

"Connect Red kappingin" - Føroyar

Frá 1. mai til 30. september 2000 skipar Coca-Cola fyri einari stórari kapping.

Hvørja ferð tú drekkur eina Coca-Cola kemur ein serstøk Coke-koda til sjóndar á innarsíðuni á merkiseðlinum. Hetta er tín Coke-koda, sum tú kanst brúka í Connect Red kappingini og vinna eina ørgrynnu av góðum vinningum hvønn einasta dag. Kodan finst á 50 cl. og 150 cl. Coca-Cola og Coca-Cola light fløskum.

Tú luttekur í kappingini við at vitja heimasíðuna www.coca-cola.dk. Fyrstu fer tú luttekur í kappingini skalt tú m.a. skriva telefonnummar og bústað.

Gevið gætur: Tá tú skrivar telefonnummarið (leikaranummar) skalt tú skriva tvey eitttøl frammanfyri, so telefonnummarið telur átta tøl.

Dømi: Telefonnummar 311161 skal skrivast 11311161. Grundin fyri hesi broyting er tøknilig, og vinningar verða sjálvsagt sendir til innskrivaða bústaðin. Av tøkniligum ávum ber ikki til at luttaka gjøgnum telefon úr Føroyum.

Ein ørgrynna av nýggjum vinningum eru hvønn dag. Tú kanst síggja hesar vinningar á internetinum.

Fá meira at vita um kappingina og reglarnar á innarsíðuni á merkiseðlinum, á internetinum www.coca-cola.dk ella á telefon 3838 3900.

Góða eydnu og gott summar

Coca-Cola enjoy

vitja... www.coca-cola.dk

Vit ynskja GÍ hjartaliga tillukku við løgmanssteypinum

HØVUÐSSTUÐUL

KAUPTHING
FØROYAR · ÍLØGUBANKI

Tinghúsvegur 14 • Tórshavn
Tel 351500 • Fax 351501
www.kaupthing.com

Sosialurin - 311820